




# Berufsverbotið mótvegis Árna Dahl



Val

TÓRBJØRN JACOBSEN
Tjóðveldi

Eftir miklan dramatikk í tinginum dastið av degnum og kvøldinum við, skrivaði løgmaður val út hóskvøldið 6. desember til at vera 19. januar. Siðvenja er, at landsstýrið virkar sum starvsstjórn, eftir at slík ultimativ boð eru komin. Tvs., at løgmaður og landsstýrismenn ikki avgreiða onnur mál enn tey, sum eru lívsneyðug, fyri at samfelagið kann rekast hagartil onnur heimastýrisstjórn er skipað. Tað skuldi tó ikki ganga long tíð, so var landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum á øllum breddum, eftir ein tíðindafund, har hann helt hov saman við fjølmiðlunum, og greiddi vítt og breitt frá eini nøgdsemiskanning, sum vísti, at føroyingar vóru heilt væl nøgdir við sítt heilsuverk. Hans Pauli Strøm royndi sjálvsagt at transformera hesa gleðina yvir á seg sjálvan og Javnaðarflokkin. Tað eydnaðist haðartil onnur fóru undir at nærlesa kanningina, og sum nú meira ella minni staðfesta, at landsstýrismaðurin hevur manipulerað í almenna rúminum við kanningini. Sjálvandi, fyri at flokkur hansara skal fáa politiskan vinning burturúr, ein góðan mánaða fyri løgtingsvalið.

Stutt eftir hetta ynskir løgmaður at hitta løgtingsins uttanlandsnevnd. Trýstur av amerikanskum myndugleikum og ditto hervaldi, ígjøgnum donsku sentralmaktina sjálvandi, ynskir hann at fáa nevndina, at blástempla amerikanskan flutning til og frá m.a. Iraq - í føroyskum loftrúmi. Einasti sum mótmælti var Hergeir Nielsen. Ímeðan John Johannessen og aðrir apologetar hjá amerikanskum og donskum valdi í Føroyum stuðlaðu hesi aktini. Hini aðru síðani valið varð útskrivað.

Ímeðan tær báðar undanfarnu aktirnar vóru politiskar, fyri ikki at siga partapolitiskar, so snúði triðja aktin seg um nakað so basalt sum føroyska málið. Móðurmálið. Almennan málpolitikk. Uppskotið smíðað samsvarandi einum løgtingsuppskoti, sum í síni tíð var samtykt samfelt. Oddviti málstevnunevndarinnar, hin í mentanarstarvi durkdrivni Árni Dahl, var komin allan tann langa vegin úr Hattarvík, fyri at handa Jógvani á Lakjuni álitið, sum var tilevnað samsvarandi arbeiðssetningi Mentamálaráðsins, og hartil hevði nevndin verið so sjáldsama virkin, at hon sum ein av teimum fáu, varð liðug við sítt avrik á tí evsta marki, landsstýrismaðurin hevði sett teimum. Lýst varð til tíðindafund í Mentamálaráðnum týsdagin 18. desember kl. 14. Vit, limir í mentanarnevnd løgtingsins, fingu serliga skrivliga innbjóðing til tíðindafundin. Stutt fyri døgverða komu tó kontraordrar í SMS-boðum yvir fartelefonina, um at fundurin og haldið vóru avlýst. Kommandoordrar vóru komnir uttast av Tinganesi, løgmaður hevði intervenerað, og hevur helst hildið álitið verið somikið kontroversielt, at ongin mátti fáa nakað at vita um hetta. Móðurmálið var nú vorðið meira hættisligt fyri eina starvsheimastýrisstjórn enn tað, at sita úti í Almanna- og Heilsumálaráðnum og reka partapolitikk, javnaðarpolitikk, við sjúkrahúskanning frá serfrøðingum sum grundarlagi, og at renna ørindir fyri stórveldið vestanfyri og donsku hjálandaveldismyndugleikarnar í hernaðar- og krígsmálum.

Kanska vildi løgmaður bara seta eitt stik niður, áðrenn allir hansara teknar fóru at glíða í koblingini. Nú skuldi konsekvensur aftur vera galdandi sambært siðvenju hjá eini starvsstjórn. Helst hevur Árni, nú hann var í metropolinum allíkavæl, handað Jógvani álitið í onkrum skýmaskoti, úti undir væðingini í Mentamálaráðnum, tí seinri sama dagin var rapportin til skjals á heimasíðu ráðsins. Nú mundi fara at vera friður, hugsaðu tey flestu. Men pílar í skot um ikki løgmaður aftur skifti kós dagin eftir. Demokratia skuldi halda tíðindafund, har eitt álit skuldi handast Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum. Fundurin varð fluttur úr Vektarbúðini niðan í fyrrverandi sosialdemokratisku høvuðsborgina, Miðlahúsið í Vágsbotni. Eitt av høvuðsvalevnum Javnaðarflokksins, Eyðgunn Samuelsen, helt hov saman við fjølmiðlunum. Bjarni Djurholm var hjástaddur, og fekk álitið handað. Báðar loftrásirnar gjørdu nógv burturúr tíðindafundinum í tíðindasendingunum á miðdegi og áhaldandi fram eftir degi. Dimma endurgav løgmann fyri at hava sagt, at tað var í fínasta lagi, at Djurholm var á fundinum, og tók ímóti áliti frá einum av toppkandidatum Javnaðarflokksins til løgtingsvalið 19. januar.

Samsvarandi hesum er niðurstøðan, at alt koyrir bara upp á besta beskubb og at ongin konsekvensur er í nøkrum, sum Eidesgaard tekst við í sínum politiska oddasessi. Útinnandi landsins evsti. Og í hesum sambandi kundi verið áhugavert at fingið at vita, hvør munur er á Málstevnunevndini og Demokratia, í mun til starvstjórnarsiðvenjuna um fullkomið afturhald í tíðini, eftir at val er útskrivað? Árni Dahl er mær vitandi ikki valevni fyri nakran flokk, tí átti tað at verið meira legalt og legitimt, at hann slapp at halda sín tíðindafund, heldur enn Eyðgunn Samuelsen, sum er aktivur politikkari, eitt av høvuðsvalevnunum og starvsnevndarlimur í Javnaðarflokkinum. Skal tó bera yvir við, at løgmaður ikki vildi bróta paktina við Djurholm, hesin er ás hansara inn í Fólkaflokkin og harvið valdið, tað snýr seg jú um, at báðir yvirliva, og tá kann ein ávís kynisma helst góðtakast í flokkunum teir umboða.

Týskararnir settu í verk eina lóg um berufsverbot í 1972. Varð ivi sáddur um loyalitetin hjá einum fólki mótvegis samveldisstatinum, var viðkomandi forðaður í starvssetan hjá almenna myndugleikanum. Greiður farvegur av hesum sæst nú aftur í Føroyum. Eftir at Eidesgaard-regime hevur slitið bonaðu dúrkini í 4 ár. Spurningarnir eru tí tvinnir: Heldur løgmaður apartapolitiskar mál- og mentanarspurningar ongan týðning hava fyri tjóðina og fólkið, ella skal atburðurin hjá Eidesgaard skiljast sum eitt berufsverbot andvegis Árna Dahl og Co., sum hava gjørt eitt megnararbeiði. Hvussu er Árni komin undir illgrunasemi, eftir at hann varð settur formaður í fjør, og hvat er og verður hann illtonkur fyri? Ella var trupulleikin bara hann, at álitið um almennan málpoltikk var tilevnað samsvarandi einum uppskoti frá Tjóðveldinum? Og at hugmóð løgmans ikki toldi luktin úr tí bakarínum, sum formaðurin í tingbólki hansara plagar at orða seg?

Paradoksali tragikomikkurin gjørdist nú fullkomin, táið Jóannes Eidesgaard pyntaði seg við lántum fjaðrum frá Málstevnunevndini í nýggjársrøðuni gamlaárskvøld. Helst trýstur av umrøðuni, sum álitið hjá Árna og feløgum hansara nú fær í øllum grannalondum okkara, serliga hugskotið um at lógáseta føroyska málið sum tjóðarmál í landinum, og at móðurmálið, sum hitt einasta, skal nýtast í almennum málum, eisini teimum sum framvegis ikki eru komin undir føroyskt málsræði. Kanska var hetta orsøkin, sum fekk løgmann at bólta rút í júst hesum málinum. At hann legði leinkjur á Lakjumannin. Tað ræður um at forða rákinum mótvegis gomlum sosialdemokratiskum arvasilvuri, sum er danskt vald í Føroyum og ein møletin donsk Heimastýrislóg.

Sum ein málbar seg fyri 4 árum síðani: Her má vend koma í !

# Sterkur og ábyrgdarfullur arbeiðsmarknaður



Val

JOHN JOHANNESSEN
Javnaðarflokkurin

Fortreytin fyri einum sterkum vinnulívi er eitt trygt, vælútbygt vælferðarsamfelag, ið gevur einstaka menniskjanum møguleika at útbúgva og menna seg og harvið tryggja samfelagnum eina stabila, væl útbúna og virkisfúsa arbeiðsmegi.

Javnaðarflokkurin stuðlar einum sterkum vinnulívi á burðardyggum grundstøði, sum er grundarlagið undir einum góðum vælferðarsamfelag. Vinnulívið eigur at kenna sína ábyrgd fyri tí fólki, ið virkar í vinnuni, fyri samfelagnum, náttúrutilfeinginum og umhvørvinum.

Fortreytin fyri einum væl virkandi samfelag er javnstøða millum kynini á arbeiðsmarknaðinum og í familjuni. Tí skal ein nýmótans familjupolitikkur tryggja, at familjan hevur møguleika at sameina arbeiðslív og familjulív. Tað skal vera sjálvsagdur rættur, at bæði foreldur hava møguleika at tryggja teirra børnum eina góða byrjan í lívinum.

www.john.fo

# Vága Floghavn skal útbyggjast nú!



Val

KITTY MAY ELLEFSEN
Fólkaflokkurin

Sum so ofta í Føroyum, so byrja vit at kjakast eftir, at vit hava tikið avgerðina. Soleiðis er eisini við Vága Floghavn. Eftir at partafelagið Vága Floghavn varð stovnað, fór kjakið í gongd um, hvar ein framtíðar flogvøllur skal liggja. Stór ósemja er millum tey sum føra seg fram, og ikki skal nógv hugflog til at skilja, at her kemur neyvan nakað at henda í bræði.

Tað er heilt víst, at um vit nú steðga á fyri at kanna og viðgera, hvar ein komandi møguliga alternativur flogvøllur skal liggja, so hendir einki fyrstu fleiri árini. Kjakið um alternativan flogvøll hevur koyrt í minst 20-25 ár, og skulu vit nú steðga á, so ganga óivað minst 20 ár afturat, har einki hendir; og tað hava vit ikki ráð til at bíða eftir!!!

Tað er altíð skilagott at kanna eftir og viðgera, hvussu vit optimera okkara samferðsluviðurskifti bæði innlendis og við útheimin, men hetta má ikki forða okkum í at gera tað, sum beint nú liggur klárt at fáa avgreitt og har vit nú hava møguleikan at smekka til.

Við ætlaðu útbyggingini fáa vit eina góða loysn, sum verður við til at skapa øktar møguleikar fyri samfelag okkara, og best av øllum - vit fáa loysnina skjótt.

Eftir at flogvøllurin varð yvirtikin, er heimild fingin fyri at niðurkapitalisera íleggingargrunnin við 360 mió. kr. Pengarnir eru oyramerktir til útbygging av Vága Floghavn – og einki annað.

Sostatt vóru allar fyritreytir fyri at fara í gongd upp á pláss. Tað er tí harmiligt, at Sambandsflokkurin, við at forkoma samgonguni, legði arbeiðið við Vága Floghavn í skeljasor og tað er enn meira harmiligt, at Tjóveldið nú av øllum alvi arbeiðir ímóti útbygging av Vága Floghavn.

Tí er greiði boðskapurin: - Latið okkum útbyggja Vága Floghavn beinanvegin, – tí um vit ikki gera tað nú, so verða vit noydd til at liva við núverandi flogvallarviðurskiftum nógv ár framyvir.